## Noreg misrøkir oljuna

Norðmenn kundu fingið meiri burtur úr oljuævintýrinum. Tað heldur í hvussu er granskarin Kjell Aleklett, sum er oljuserfrøðingur á lærda háskúlanum í Uppsala í Svøríki. Hann vil vera bvið, at norðmenn hava alt ov stóran skund við at pumpa oljuna upp úr undirgrundini, og tað ger, at teir noyðast at selja oljuna fyri minni, enn teir kundu fingið seinni. Harafturat minka norsku oljugoymslurnar í undirgrundini skjótari enn neyðugt, sigur svenski granskarin.



## Ovurstórur inntøkumunur

Tað er væl kent, at norðari partur av Italia er nógv betur fyri fíggjarliga enn tann syðri parturin, og ein nýggj kanning staðfestir, hvussu stórur munur veruliga er á inntøkunum í teimum báðum økjunum. Í norðuritalsku kommununi Ayas í Valle d'Aosta, sum er tann ríkasta i landinum, er meðalinntøkan oman fyri 66.000 evrur ella 490.000 krónur. Í teirri fátækastu kommununi, Plati í Reggio Calabria, sum er har suðuri í landinum, er meðalinntøkan beint oman fyri 4.000 evrur ella smáar 30.000 krónur.

# ðir fyri Obama

av umboðum, sum skulu veljast til ymiskar stovnar umframt til tingið, sum hevur sæti í Capitol í Washington. Millum annað eisini dómarar, sheriffar, so tað er nóg mikið at seta seg inn í og at taka støðu til.

Diddan var annars eisini virkin til seinasta forsetaval, og er tað kanska enn meira nú.

Fyrsta stigið í einum slíkum vali er undanvalini, sum vit hava hoyrt so nógv um í vár. Fyri at sleppa at velja skal hvør veljari skrásetast. Hann kann velja at lata seg skráseta sum republikanskur, demokratiskur ella óheftur veljari. Til sjálvt forsetavalið bindir hetta kortini ikki. Mannagongdin er tann, at fyrst skal roynast at fáa flest møguligar veljarar at skráseta seg, helst hjá sínum egnu flokkum.

Til undanvalini kunnu veljarar so bert velja valevni fyri tann flokk, har teir eru skrásettir.

### Stuðlaði fyrst Hillary….

Síðan er tað avgerandi hjá einum virknum floksstuðli at fáa valt sítt valevni í flokkinum. Til hetta forsetavalið var Diddan í fysta umfari stuðul hjá Hillary Clinton, sum upprunaliga var greiður favorittur at gerast demokratiskt forsetavaleni.

Uppgávan er so at fara frá fólk til fólk og royna at sannføra tey um dygdina á júst sínum valevni. Við teldutøknini verður hetta eisini gjørt við at senda teldupost til tey ein kennur, og so at fáa tey at senda hann víðari til fólk, sum tey kenna.

Diddan hevur eisini verið á veljarafundi saman við Hillary og hevur heilsað upp á hana. Hon var eisini rættuliga imponerað av Hillary. Hon hevði eina framløgu upp á ein tíma uttan manuskript og uttan at hakka í tí. Aftaná vóru spurningar, og hon stóð ikki føst í nøkrum teirra. Diddan heldur, at hon kundi verðið ein góður forseti.

Tað var tó ymiskt, hvat børnini hjá Didduna atkvøddu, hóast tey øll valdu ein demokrat. Eitt teirra atkvøddu fyri Hillary Clinton, eitt fyri Barack Obama og eitt fyri John Edvards. John Edvards kom ikki langa leið í stríðnum, áðrenn hann gav upp. Hann hevur verið nevndur sum varaforsetaevni. Men eftir, at hann er tikin við "buksunum niðri" saman við einum øðrum konufólki, samstundis sum hann hevur eina kreftsjúka konu, er hann úti av myndini!

Hillary vann í Californina og øðrum stórum statum, men hetta var ikki nóg mikið. Tað verður tosað um, hví Hillary hóast alt tapti. Hetta heldur Diddan vera jaulosi ella øvundsjúka. Tey eru nógv, sum ikki kunnu torga Hillary, summi enntá hata hana. Av einum konufólki at vera í poltikki er hon jú ógvuliga brasin. Øll møgulig ósaklig argument hava verið brúkt ímóti henni. Millum annað, at hon brúkar mannin Bill sum lopfjøl fyri at koma framat, hóast hon saktans kundi klára seg eins væl uttan hann. Her er snøgt sagt talan um ta sokallaðu jantulógina.

### …..men stuðlar nú Obama

Nú stuðlar Diddan so Obama av heilum huga. Hann hevur eisini havt eina merkisverda karrieru. Pápin er úr Kenya, og Obama hevur búð mong ár í Indonesia, hagar mamman varð gift. Hon er deyð nú.

Hjá Didduni er tað sera



*Fyrst stuðlaði Diddan Hillary Clinton….*



*Mary og Knút í USA*

umráðandi at fáa ein demokrat til forseta. USA hevur nú í átta ár eftir hennara tykki havt ein ódugnaligan forseta, hvørs høvuðsavrik hevur verið at bróta niður ta lóggávu, sum demokratarnir hava bygt upp í ártíggir. Tað er ein sannroynd, at demokratiski flokkurin hevur staðið fyri teimum nýskipanum til verju av borgarunum, sum eru framdar á lóggávuøkinum í USA tey nógvu seinastu árini, heilt aftur til Roosevelt í 1930-unum.

Kríggið í Irak hevur verið ein vanlukka, sum er bygd á



*….men nú arbeiðir hon av øllum alvi fyri Barack Obama*

ósannindi hjá Bush og hansara monnum. Hetta hevur eisini gjørt heimin nógv ótryggari. Álopið á Afganistan var hinvegin í lagi, tí tað var próvfast, at hiðani varð skipað fyri yvirganginum 11. september 2001.

Barack Obama verður uttan iva kosin forsetaevni á floksráðstevnuni seinast í august. Spurningurin er so, hvønn hann fer at velja sær sum varaforsetaevni. Tað er stórur spenningur um hetta, og nógvar gitingar eisini. Hillary hevur verið uppá tal, men tað verður neyvan hon. Diddan heldur, at Wesley Clark er tann best egnaði. Hann er generalur, og hevur verið ovasti fyri amerikansku deildirnar í Europa. Tí hevur hann eisini skil á uttanríkispolitikki, kanska meira enn Obama sjálvur.

### Skitið valstríð

Eitt er at gerast valevni. Eitt annað er at verða valdur. Hetta verður eitt hart toyggj. Amerikansk valstríð eru kend fyri at vera sera skitin, og serliga er hetta galdandi fyri republikanska høgravongin, har einki vápn er ov groft.

Tað eru í hesum døgum komnar út tríggjar bøkur, hvørs endamál er útspilling av Obama. Ein av hesum er enntá komin á bestseljaralistan í USA. Hesar kreftir føra seg fram við tilvitandi ósannindum. Eitt av hesum er, at Obama er muslimur. Hetta verður sjálvsagt gjørt fyri at skaða hann. Fólk eru so óupplýst, at nógv trúgva tí, hóast Obama alment er kristin.

Við seinasta kongressval í USA fingu demokratarnir meirilutan. Hetta hevur verið eitt framstig, so Bush ikki kundi gera júst, sum tað passar honum. Vansin er tó, at forsetin kann nýta sýtingarrættin, um eitt uppskot ikki er samtykt av 2/3 av atkvøðunum. Hesa ferð skal alt umboðsmannatingið veljast av nýggjum og triðingur av senatinum. Valskeiðið hjá umboðmannatinginum er bert tvey ár, meðan tað er seks ár hjá senatslimum.

### Schwarzenegger ikki so galin

Fyri nøkrum árum síðani var skilið í Californina so ringt, at demokratiski guvernørurin Gary Davis varð settur frá. Hetta endaði við, at sjónleikarin Arnold Schwarzenegger varð valdur til guvernør umboðandi republikanska flokkin. Tað mundu vera fleiri, sum ivaðust í førleikan hjá honum, og tey spurdu, um hann hevði annað enn muskl-ar at vísa á. Hann var jú kendur sjónleikari sum "supermaður."

Tað hevur tó víst seg, at hann hevur ikki verið so galin. Hann hevur víst seg at vera hógligur og semjusøkjandi. Kanska hevur tað sína ávirkan, at kona hansara er úr sjálvum hjartanum í demokratiska flokkinum. Hon er nevniliga systirdóttir Kennedybrøðurnar. Hon hevur eisini boðað, at hon stuðlar Obama til forsetavalið.

Tað verður sagt um Schwarzenegger, at hann er ein demokratur í republikanskum klæðum.

### Mary aftur til Føroyar

Knút legði frá sær hjá Mærsk í 1991. Tá fluttu tey norður til Seattle-leiðina við markið til Canada, har tey fingu sær eini hús, sum lá út til sjógvin. Knút fekk sær bát, so hann kundi fara á flot. Her fingu tey eisini vitjan av Didduni.

Hetta gekk eisini væl, til Knút gjørdist sjúkur. Tískil fluttu tey heim til Føroyar í 2001. Hjá Knúti gekk støðugt afturá, og hann doyði í 2003.

Mary býr nú í eini hugnaligari íbúð í Dalatún mitt í Havnini. Hon eigur trý børn, sum búgva í hvør sínum heraðshorni. Niclas býr í Føroyum, Hedvig í Danmark og Johannes Juul í Californina.

Diddan hevur verið heima í summar. Her hevur hon arbeitt sum sjúkrasystir og hevur búð hjá Mary. Tær hava rættuliga kunnað tosað saman um ta góðu tíðina, tær plagdu at koma saman í USA.

Men nú fer Diddan heim aftur. Hon býr uppi í fjøllunum í Californina í einum eftir amerikanskum viðurskiftum lítlum býi Truckee, har tað búgva 15.000 fólk. Hennara trý børn og tvey ommubørn búgva eftir amerikanskum viðurskiftum ikki langt burtur. Tey klára seg annars hampuliga á føroyskum.

Tey vóru fýra systkin hjá Didduni. Maud og Svenn eru deyð. Á vegnum heim fer hon fyrst at vitja systir sína Lis Mari, sum býr í Noregi. Síðan fer hon í Danmark eisini at vitja sína 100 ára gomlu bragdligu mostir Katrinu við Keldu.

Heima í California verður nóg mikið at gera hjá Didduni at fáa Obama valdan. Vit onnur kunnu bert vóna, at hetta fer at eydnast!